# Heildin er har




*Heini Joensen noyddist ein túr í læknarúmið undir fyrra hálvleiki, men hann kom tó aftur á vøllin, har hann fekk prógvað sitt virði fyri liðnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Heini Joensen var hampuliga væl nøgdur um føroyska avrikið sunnudagin, og sjálvur helt hann, at føroska liðið nú er við gerast ein verulig heild, har allir stríðast fyri øllum**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Fyri mong mundi tað vera óvæntað, at Heini Joensen ikki taldust millum leikararnir, sum umboðaðu Føroyar í fyrra landsdystinum um vikuskiftið.

Seinna dystin móti Ísrael var sterki lámurin tó aftur millum álitini á liðnum, og hann prógvaði til fulnar, at tað er neyðugt við eini skotsterkari vinstrahond, tá landsliðið spælir.

Hóast hann sostatt fekk prógvað sítt virði í seinna dystinum, so tóktist hann ikki á nakran hátt vónbrotin av, at hann ikki hevði verið við fyrru ferðina.

- Eg havi havt eina uppgávu í skúlanum, sum varð latin inn beint undan fyrra dystinum. Hetta hevur kravt nógva orku frá mínari síðu, og tí havi eg kanska ikki verið heilt klárur í høvdinum í venjingunum upp til dystirnar, og tað kanst tú ikki loyva tær. Skalt tú vera á landsliðnum, so mást tú vera 100% við hvørja ferð.

### Knæ í høvdið

Hóast Heini sjálvur mátti ein túr í læknarúmið undir dystinum sunnudagin, so kom hann aftur á vøllin í seinna hálvleiki, tó at hann tá hevði eitt stórt plástur á høkuni. Sjálvur segði hann um hetta, at ein ísraeli hevði traðka seg á andlitið ta einu ferðina í fyrra hálvleiki, men hóast hørðu viðferðina, so lat hann tó hampuliga væl at dystinum.

- Eg haldi í øllum førum, at vit fingu víst, at vit hava eitt hampuliga gott lið. Hetta liðið, sum spældi í dag, er tað sama, sum hevur verið saman til allar venjingarnar, og eg haldi sjálvur, at vit til tíðir spæla ein fínan dyst í dag. Vit stríðast væl fyri hvørjum øðrum, og ikki minst í fyrra hálvleiki riggar tað væl, har vit veruliga fáa frustrerað teirra leikarar.

- Í seinna hálvleiki var tó øðrvísi. Teir skifta málverjan út, og nýggi málverjin tekur so at siga alt, sum vit skjóta eftir honum. Vit kundu kanska í fleiri førum havt bíðað eitt sindur longri við skotinum, men hinvegin vóru vit eisini alla tíðina undir hørðum trýsti.

### Stríðast alla tíðina

Tveir dystir eru eftir hjá føroyska landsliðnum í hesari undankappingini. Belgia stendur fyri framman, og longu tá lutakastið var, varð roknað við, at hetta mundu verða dystirnir, har føroyska liðið hevði bestan møguleika at standa seg.

- Nú kenni eg einki til Belgia, men á pappírinum eru teir so líðið, sum vit hava bestan møguleika ímóti. Teir taptu eisini greitt fyri Ísrael, so eftir tí at meta, so skuldu vit havt ein kjans. Men tað krevur so, at vit allir sum ein eru púrasta klárir til dystin. Avrikið skal í 60 minuttir vera hitt sama, sum tað var í fyrra hálvleiki í dag, sigur Heini Joensen at enda.

*- Tá tað gongst illa hjá okkum, so fara vit alt ov ofta heilt niður við flagginum, og tað er so avgjørt nakað, sum vit eiga at betra, heldur føroyski liðskiparin*




# Botnstøðið er ov lágt

**Ingi Olsen fýltist á, at føroyska liðið søkkur ov djúpt í aldudalunum, men hinvegin helt hann avgjørt, at føroyska avrikið var á heilt góðari leið í dystunum móti Ísrael**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Sitandi við eini banan, soleiðis at energi-depotini skjótt kunnu fyllast uppaftur, fingu vit fatur á føroyska liðskiparanum, Inga Olsen, eftir landsdystin móti Ísrael.

Eftir laka avrikið móti Finnlandi seinasta vikuskifti var lagt upp til, at føroyska liðið skuldi hava eitt slag av endurreisn, nú Ísrael kom á vitjan, og tað helt føroyski liðskiparin eisini, at okkara menn fingu.

- Í fyrra hálvleiki spæla vit í løtum fult upp til teir. Vit megna alla tíðina at fylgja við í málskjótingini, og tað er púrasta greitt, at vit frustrera teirra spæl.

- Tað er í øllum førum nakað, sum vit kunnu vera nøgdir um, men hinvegin gekst ikki so væl eftir steðgin. Størsti trupulleikin er helst, at vit ongan tíð fáa fatur á hasum bakkinum hjá teimum, sum ferð eftir ferð høggur bóltarnar inn. Vit koma ikki so mikið sum út at tackla hann, og tað er ikki nóg gott.

### Botnstøðið ov lágt

Samanumtikið heldur Ingi kortini, at føroyska avrikið var á eini leið, men hann er tó ikki í iva um, at tað kann gerast enn betri.

- Størsti trupulleikin hjá okkum er, at botnstøðið er ov lágt. Tað vilja altíð vera løtur í dystunum, har tað ikki gongst eftir vild, og tað er altavgerandi, at vit fáa minimera hesar løturnar, og at vit lata støðið fella so lítið sum møguligt.

- Tekur tú Ísrael, so hava teir sjálvandi eisini teirra tungu løtur í dystinum, men teir fella kortini ongan tíð heilt saman. Teir halda alla tíðina eitt ávíst støði, og tað er hetta, sum vit eisini mugu læra okkum. Tá tað gongst illa hjá okkum, so fara vit alt ov ofta heilt niður við flagginum, og tað er so avgjørt nakað, sum vit eiga at betra.

Ein mátistokkur í so máta man helst vera tann sannroynd, at føroyska landsliðið nú hevur brent níggju brotskøst á rað. Seinasta royndin ímóti Finnlandi var eitt brotskast, sum varð misnýtt, og átta ferðir hevdu føroyingarnir møguleikan úr sjey metrum móti Ísrael, uttan at somikið sum eitt hitt einasta mál spurdist burtur úr hesum.

Um hetta heldur Ingi, at tað so mest av øllum man koma av, at okkara leikarar ikki eru nóg kaldir, tá møguleikin er har.

- Tað sigur seg sjálvt, at tað at enda kennist sum eitt sálarligt trýst, tá vit longu hava misnýtt somikið nógv. Skjúttarnir hjá okkum eru jú allir leikarar, sum eru vanir við at taka brotskøst í gerandisdegnum, men onkursvegna megna vit slettist ikki at halda høvdið kalt í dag – og eisini fríggjadagin. Tað er sum so ikki tað stóra, sum vit kunnu gera við hetta nú, men tað sigur seg sjálvt, at tað er irriterandi, at vit ikki fáa mál upp á brotskøstini. Tað vildi í øllum førum pyntað um úrslitið, heldur hann.

### Út á bygd

At enda spurdu vit Inga Olsen, hvørjar vónir hann hevur til teir báðar seinastu dystirnar ímóti Belgia, sum verða á skránni komandi vikuna. Og her tykist svarið at vera eitt sindur blandað.

- Tað er einki at ivast í, at tá lutakastið var, so mettu vit, at tað var her vit høvdu størstan møguleika at fáa stig. Tað meti eg eisini framvegis, men hinvegin kenni eg einki til Belgia. Teir hava tapt fyri bæði Ísrael og Finnlandi, men tað er hinvegin púrasta greitt, at um vit ikki berjast í samfullar 60 minuttir, so fáa vit einki burturúr.

Og so heldur føroyski liðskiparin eisini, at tað hevði ikki gjørt nakað, um tann dysturin varð leiktur aðra staðni enn í Havn.

- Eg veit ikki hví, men áskoðararnir her eru óvanliga friðarligir. Fyri tað nógva munnu tað vera tey somu fólkini, sum eru til dystirnar, men kortini var stuðulin nógv betri, tá vit leiktu í Vestmanna. At flestu dystirnir eru lagdir her, var nokk orsakað av, at ætlanin var at senda teir beineliðis í Sjónvarpinum, men tað verður so helt bara gjørt við tann seinasta.

- Tá tú tosar um manshondbólt í Føroyum, so er tað fyrst og fremst Skála, Vestmanna og Havnin, sum hava verið frammi seinnu árini, so sjálvandi áttu dystir at verið leiktir á øllum hesum støðum, og so gjørdi tað heldur einki, um dystir eisini vórðu lagdir aðrastaðni, men tað má so vera eina aðru ferð, sigur føroyski liðskiparin at enda.



# Kvinnulandsliðið kemur

**Formaðurin í Hondbóltssambandinum sigur, at hóast einki ítøkiligt enn er komið burturúr, so arbeiðir HSF framvegis við ætlanunum um eitt A-landslið hjá kvinnum**

HONDBÓLTSLANDSLIÐ
*Jákup Mørk*



*A-landsliðið hjá kvinnunum kemur. Tað er formaðurin í HSF ikki í iva um, og hann sigur, at komandi vikurnar fer HSF at leita sær eftir venjara til kvinnurnar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

– Lívið er ov stutt til kvinnuhondbólt.

Tað er ein av útsøgnunum, sum áður hevur verið at hoyrt í Danmark um altjóða luttøkuna hjá kvinnum, men hetta man í øllum førum vera broytt seinnu árini.

Her í Føroyum tykist tað tó framvegis vera so, at áskoðanirnar um hetta eru ymiskar. Í samrøðu við Sosialin beint fyri ársskifti var Kári Mortensen tó av teirri áskoðan, at hann fyri alt í verðini vildi hava, at kvinnurnar eisini sluppu upp í part. Hansara áskoðan í hesum var, at fyri útbreiðsluna av hondbóltinum hevði eitt kvinnulandslið helst størri týdning enn manslandsliðið, tí fyri kvinnurnar tykist hondbóltsurin framvegis at vera ein hin fremsta ítróttargreinin, meðan menninir í dag mugu ásanna, at fótbóltin so dyggiliga hevur yvirhálað teir í so máta.

Um sama mundi segði landsliðsvenjarin hjá monnum, Lars Nedergaard, at eftir hansara tykki átti HSF at satsa nógv meira upp á menninar, enn gjørt verður nú. Somikið kontantur var hann, at hann meira enn róði uppundir, at HSF mátti gera upp við seg sjálvt, hvørt teir yvir høvur skuldu hugsa um kvinnuhondbólt, heldur enn at nýta alla orkuna til menninar.

### Kvinnurnar fáa sítt

Enn hevur lítið ament verið at hoyrt frá nevndini í HSF í so máta, men í leikskránni til landsdystirnar móti Ísrael kom so ein útmelding, sum ivaleyst hevur glett nógvar kvinnuligar leikarar.

– Tað kann so vera hansara áskoðan, men tað er avgjørt ikki áskoðanin hjá HSF, skrivaði formaðurin í HSF, Petur Ove Petersen, millum annað um útsøgnina hjá landsliðsvenjaranum.

Petur Ove viðgongur tó, at enn er ikki so nógv hent hesum viðvíkjandi, men at hetta avgjørt er nakað, sum stendur frammarliga á skránni nú.

– Enn er ikki nakað ítøkiligt hent viðvíkjandi kvinnulandsliðnum, so í so máta er støðan óbroytt. Akkurát nú hava vit sjálvandi úr at gera við EM-undanakappingini hjá monnum, men tá hon er komin aftur um bak, t.v.s. mikudagin fyri okkara part, fara vit at hava eitt slag av eftirmeting. Her verður kvinnulandsliðið eitt av punktunum á skránni, og tað er mín vón, at vit heilt skjótt kunnu seta ein venjara til hesa uppgávuna, sigur Petur Ove Petersen.

Eftir ætlan skuldi kvinnulandsliðið taka lut í EM-undankappingini, sum verður leikt í oktober mánaði í ár, men formaðurin í HSF sigur, at hesar ætlanirnar nú eru sleptar.

– Tað verður so ikki í slíkum høpi, at vit fara at taka lut á hesum sinni. Hinvegin er ætlanin, at vit kunnu fáa onkrar millumtjóða kappingar, evt. við íslendska landsliðnum og einum triðja landi, soleiðis at talan kortini verður um altjóða dystir. Fyrimunurin við slíkum kappingum er sjálvandi eisini, at tær eru munandi minni krevjandi fíggjarliga, og eg ivist ikki í, at ítróttarliga vildu slíkar kappingar eisini verið spennandi, sigur Petur Ove Petersen at enda.

Stjørnan-VÍF 17-25 (7-15):

# Nú eru bert VÍF og VB

**Stjørnan fekk greitt og týðiliga at vita, at tær skulu ikki gera sær vónir um at leggja seg í oddastríðið, har tað nú bert tykjast vera VÍF og VB**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Spenningurin í Klaksvík var stórur, nú Stjørnan á heimavølli skuldi seta hol á endaspælið við dystinum móti VÍF. Júst hesi bæði liðini vóru undan dystinum bert eitt stig aftan fyri VB á oddasessinum, og tí var hetta kanska fyrst og fremst ein styrkisroynd, har gerast skuldi av, hvør teirra skuldi elta VB.

Og var tað so, so er tað í dag eingin ivi um, at tað er VÍF, sum hevur fingið tann leiklutin. Uttan stórvegis hóvasták eydnaðist nevnliga teimum gulu at vinna ein tryggan sigur á sambiðlunum í oddastríðnum, og settu tær harvið í fyrsta atløgu Stjørnuna til víks í oddastríðnum.

Fyrstu løtuna var tað annars ikki so nógv, sum bendi á, at talan skuldi gerast um somikið sannførandi sigur. Í einar 20 minuttir gekk tað púrasta javnt fyri seg, men so kom ferð á.

Seinastu tíggju minuttirnar undan steðginum vann VÍF 9-1, og so var tann dysturin í roynd og veru avgjørdur. Stjørnan megnaði ongan tíð á nakran hátt at skapa nakran spenning í aftur, og royndu VÍF-leikararnir kundu uttan stórvegis hóvasták koyra sigurin heim.

### Útskiljing

Sum nevnt omanfyri, so mundi sigurin eisini vera ein staðfesting av, at tað nú eru VÍF og VB, sum skulu kappast um gullmerkini. VB gjørdi í so máta sína skyldu, tá tær á Skála vundu burtur úr StÍF, sum annars eisini hevur verið væl við í ár.

Og tað er einki at ivast í, at VÍF nú aftur eru um at vera gearaðar til at endurvinna FM-heitið. Við undantakið av dystinum móti Kyndli, so hevur talan eftir eina trupla byrjan verið um sigursgongd hjá liðnum. Verjan og málverjin í felag syrgja fyri, at mótstøðuliðini ongan tíð fáa fótin fyri seg í álopspartinum, og við kontraálopunum, sum hetta kastar av sær, hevur VÍF eitt vápn, sum fyri flestu mótstøðuliðini er lívsvandamikið.

Hjá Stjørnuni var talan hinvegin heldur um eina staðfesting av, at hópurin er í minna lagi, tá tosast skal um gullmerki. Hinvegin var vernadi støðan so als ikki nakað, sum leikarar ella áskoðarar hugsaðu um, tá kappingarárið byrjaði. Bara tað at liðið er við í kappingini um heiðursmerki er eitt gott úrslit higartil, og kunnu tær halda sær somikið ovarliga alt árið, munnu tey flestu vera meira enn væl nøgd.



*Jacklin Durhuus, sum her sæst í álopsroynd, fekk sjey mál á persónligu kontina, tá VÍF um vikuskiftið vann tryggan sigur í Klaksvík*

### Dysturin í tølum

Stjørnan-VÍF 17-25 (7-15)
**Málskjúttar:**
**Stjørnan:** Danijela Ercevic 8(1), Bára S. Klakstein 4, Natasha Stamenkovic 4, Ragna Andreasen 1
**VÍF:** Jacklin Durhuus 7(1), Hertha Simonsen 4, Sóley Mikkelsen 4 (2), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 4, Nicoleta Radu 3, Fríða Marjunardóttir 2, Eyðritt Andreasen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 4, VÍF 5
**Útvísingar:** VÍF 4
**Dómarar úr Kyndli:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen.